# Sølufólk

## Lagurformaður

Til lagri hjá Klaksvíkar Timburhandli søkja vit eftir sølufólki - lagurformanni til deildina at byrja sum skjótast.

Arbeiðsuppgávurnar eru kundaavgreiðsla har stórur dentur verður lagdur á handverkararnar, innkeyp av vørum, samskipan av arbeiði og avgreiðslu og annað fyrifallandi.

**Vit vænta:**

- at tú ert 25-45 ár
- at tú hevur útbúgving innan fakið ella drúgvar royndir innan økið
- at tú ert álítandi og arbeiðssamur/som
- at tú hevur lætt við at samstarva við onnur

**Vit bjóða:**

- fasta løn eftir nærri avtalu
- tryggar arbeiðsumstøður
- møguleiki fyri menning á økinum

Hevur hetta tín áhuga, send okkum so skrivliga umsókn saman við møguligum prógvum/viðmælum til:

**Klaksvíkar Timburhandil**
**att.: Símun á Høvdanum**
**Stangavegur 5**
**Postboks 48**
**700 Klaksvík**

**P/F KLAKSVÍKAR TIMBURHANDIL**
Stangavegur 5 • FO-700 Klaksvík • Tel. 45 51 49 • Fax 45 73 49

Sosialurin - 311820



**Føroya Handilsskúli**

# LÆRARI

Til Føroya Handilsskúla á Kambsdali

Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir lærara/um í **Enskum A - 10 t/v og/ella sálarfrøði C – 4 t/v** at byrja tann **1. februar 2000** og fram til 1. juli 2000.

**Førleikakrøv**
Prógv frá handilsháskúla, lærdum háskúla ella onnur við øðrum fortreytum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

**Setanarkor**
Eftir avtalu við Føroya Handilsskúla og Undirvísingar- og mentamálastýrið. Góðir møguleikar eru fyri at halda fram í fullum starvið aftaná summarfrítíðina.

**Løn**
Í lønarrensli 13/21/24, 18/26/29 16/21/29/31 hjá HL ella eftir avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Elsu Mariu Olsen, deildarstjóra.

**Umsókn**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu verða skúlanum í hendi **í seinasta lagi 24. januar 2000** og sendast til:
**Føroya Handilsskúli**
**Kambsdalur**
**FO-530 Fuglafjørður**

*Á Føroya Handilsskúla verður stór áherðsla løgd á at nýta nútímams undirvísingarhættir. Umstøðurnar á skúlanum eru góðar og serligur dentur verður lagdur á kunningartøkni.Tess vegna søkja vit eftir undirvísarum, sum hava stóran áhuga í at menna tøkniliga ástøðið og altjóðageringina enn meira og at menna samstarvið við vinnulívið.*

Sosialurin - 311820

**FØROYA HANDILSSKÚLI** Kambsdalur - 530 Fuglafjørður - Telefon 444900 - Telefax 444901
Teldupostur: elol@kambsdal.olivant.fo









**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$

212380







# Flýddu undan vatnflóð

*Ein familja kom illa fyri á eini útferð niðanfyri eina av vatnbrunnunum hjá SEV norðanfyri Vestmanna í summar. Uttan nakra ávaring slepti SEV vatninum úr brunninum*

DÁNJAL HØJGAARD



*Fossaverkið í Vestmanna hagani ventilurin ið vatnbrunninum hjá SEV verður stýrdur*

Ein fagnar summardag í fjør fór ein familja - maður, kona og trý børn - út í náttúruna, at njóta tað góða veðrið. Men útferðin endaði sum ein vát marra.

Tey valdu sær ein blett, beint niðanfyri tann norðasta vatnbrunnin hjá SEV í Vestmanna, Vatnið, tey rópa. Tey vaksnu løgdu seg at sóla sær meðan børnini spældu í nánd.

Knappliga - og uttan nakra sum helst ávaring - verður ein ventilur í byrgingini latin upp og eftir stuttari løtu fossar vatnið í stríðum streymi ímóti teimum.

Har var einki annað at gera enn at renna sum fyri lívinum, og til alla lukku sluppu tey við skrekkinum. Tey fingu bjargað sær úr neyðstøðuni, men sum skilst fór nakað av viðførinum til stroks við flóðini - eittnú soviposar og leikur.

## Ongin ávaring

SEV sleppur við jøvnum millumbili vatninum úr Vatninum, sum er ein goymslubrunnur, at taka til, t.d. tá turkur er. Hetta hevur verið gjørt øll árinini. Hvørki ávaringarskelti ella ávaringarskipan eru við byrgingina.

Vatnið verður latið út gjøgnum ein ventil, sum er meiri enn ein metur í tvørmát. Og tá froyðurin stendur út gjøgnum rørið er vandamikið hjá fólki at standa fyri, tí trýstið kann vera stórt.

## Fær avleiðingar

SEV-stjórin Klæmint Weihe, sigur, at vatn hevur verið tappað úr ovasta brunninum øll árini uttan trupulleikar, og at vestmenningar hava vitað av hesum.

Um allir vita tað er tó ivasamt. Pápin, sum var við í ferðalagnum, er vestmenningur, var undir øllum umstøðum tikin á bóli.

*-Er tað ikki óðamannaverk, at sleppa vatninum úr brunninum uttan nakra sum helst ávaring?*

-Tað hevur fungera í 40 ár uttan trupulleikar. Men tá onkur nú ger vart við trupulleikan, so eiga vit at gera nakað við hann, sigur SEV-stjórin.

## Ávaringar settar upp

Og sambært SEV-stjóranum verða stig tikin, til tess at forða fyri, at óhappið í fjør summar endurtekur seg.

Klæmint Weihe, sigur, at hann hevur givið boð um at seta upp ávaringarskelti við byrgingina og okkurt slag av ávaringarskipan - helst eitt blinkljós - sum boðar frá, tá SEV opnar ventilarnar.

Hinvegin verður ikki talan um at avbyrgja vegin fyri almennari ferðslu, sigur SEV-stjórin.

Eitt hálvt ár eftir dramatisku hendingina við Vatnið í fjør summar eru framvegis eingi ávaringarskelti ella ávaringarskipan sett upp við SEV-brunnin.

*-Kunnu vit rokna við at hetta verður gjørt áðrenn ferðafólkini koma í summar?*

-Tað haldi eg. Tað rokni eg við, sigur Klæmint Weihe.

Familjan, sum var fyri óhappinum við Vatnið kærdi hendingina fyri SEV í september í fjør og tey fingu svar aftur í oktober.

Familjan vil ikki gera viðmerkingar til málið. Tey meta málið sum liðugt frá teirra síðu.




